# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

12. februar fingu Brynhild og Eli Viðbjørg, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4250 gr.

15. februar fingu Eyðbjørg Robertson og Róin Olsen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4250 gr.

22. februar fingu Jonna Rasmussen og Sune Arge Methmann, Amager, ein son. Hann vigaði 3326 gr. og var 51 cm langur.

26. februar fingu Guðrun Ólavsdóttir og Marius Joensen, Brønshøj, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3450 gr.

1. mars fingu Jastrid Hovland Sivertsen og Absalon Østerø Sivertsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3850 gr.

2. mars fingu Tanda og Arnhold Simonsen, Fuglafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4645 gr.

3. mars fingu Sigga C. á Stongunum og Magnus Simonsen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3200 gr.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

Fyri 25 árum síðan:

# Stórar ætlanir um ferðavinnu






*Teir sum hava arbeitt við spurningum um framtíðar ferðavinnu í Føroyum eru f.v.: Tummas Arabo, Johan Restorff, Jákup Haraldsen, Jákup Veyhe, Sigurd Simonsen og John Sivertsen.*

Sosialurin skrivar hósdagin 8. mars 1984 um ferðavinnuna í Føroyum. Jan Müller, blaðstjóri á Sosialinum, hevur samrøðu við fólk í ferðavinnuni og limir í Føroya Ferðamannafelag.

Í 1982 komu umleið 45.000 fólk til Føroya, bæði føroyingar og útlendingar. Flutningssambandið gerst støðugt betri og fleiri fremand ferðfólk leita til oyggjar okkara. Metingar vísa, at tað um ár 1990 kanska koma 100 túsund ferðafólk til Føroya. Hesi fólk kunnu leggja so nógvan pening eftir seg, at talan verður um eina veruliga vinnu við fleiri hundrað arbeiðsplássum.

Men treytin fyri at taka ímóti einum støðugt øktum tali á ferðafólkum er, at vit fáa eina ferðamannamiðstøð, ið stýrir og skipar viðurskiftini soleiðis at ferðafólk ikki verða slept upp á fjall sum í dag.

Í løtuni liggur eitt rúgvusmikið álit um føroysku ferðavinnuviðurskiftini í landsstýrinum. Teir sum hava gjørt hetta álit, hava vónað at peningur fór at at verða settur av á fíggjarlógini til at fremja ein ferðamannapolitikk og at lóggeva á hesum øki.

Fyri 30 árum síðan:

# Eddie Skoller í Læraraskúlahøllini

Í mars 1979 vitjaði kendi danski sangarin og skemtarin Eddie Skoller í Føroyum.

Tað var Hans Henrik Vestergaard í Havn, sum tók stig til vitjanina hjá Eddie Skoller í Føroyum. Hann hevði áður fingist við slík tiltøk í Danmark og hevði staðið fyri konsertum hjá t. d. Gasolin, Burnin Red Ivanhoe og Poul Dissing.

Eddie Skoller hevði tvær konsertir í Læraraskúlahøllini í Havn.

Eddie Skoller, ella Edward Ralf Skoller, sum er hansara upprunaliga navn, varð føddur 4. juni 1944 í St. Louis, Missouri, USA. Mamman var fødd í Svøríki og pápin russiskur jøði.

Eddie Skoller flutti til Danmarkar í 1950. Eftir at hava tikið studentsprógv í 1963, fekk hann sær útbúgving sum økonomur á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn og varð liðugur í 1966. Síðan arbeiddi hann hjá Danfoss á Als.

Hansara starvsleið sum sangari og undirhaldari byrjaði, tá hann var við í ein framførslu á Danmarks Radio í 1968, og í 1969 byrjaði hann við sínum egnu framførslum.



*Eddie Skoller syngur og undirheldur í Læraraskúlahøllini í 1979*
*Mynd: Myndaárbókin – árið ið fór 1979*

Sosialurin -har tað hendir